## DAGSINS MEINING

# Ferðin

Tað tykist sum vanlukkurnar á vegunum standa við. Seinasta vikuskifti fór ein bilur í knús vesturi í Vagum. Sjey ungfólk vóru í bilinum, og bert eitt undur hevur bjargað teimum frá vanlukkuni við lívinum. Tá seinasta syrgliga stórvanlukkan hendi, fingu vit eitt seriøst og hugskotsríkt orðaskifti um ferðslutrygdina á vegum okkara. Tað gekk sum ein reyður tráður gjøgnum hetta orðaskifti, at ov nógv ferð oftast er orsøk til vanlukkurnar.

Hetta skilið við ov nógvari ferð á vegunum kann ikki halda fram. Tað er tí sera umráðandi, at orðaskiftið um ferðslutrygdina og um ov stóru ferðina á vegunum ikki tagnar. Undir orðaskftinum í fjølmiðlunum kom fram uppskot um eina ferðsluskaðanevnd. Hetta er eitt gott hugskot, ið eigur at verða tikið í stórum álvara. Tað kundi tí verið áhugavert at fingið avklárað, hvar í skipanini hetta uppskot er endað, og hvørja støðu avvarðandi myndugleikar hava til hetta hugskotið, ið kom frá leiðaranum á ferðslutrygd. Hetta uppskot má ikki bara enda í onkrari skuffu í Vinnumálaráðnum ella í Løgmálaráðnum.

Eitt annað hugskot, ið var havt á lofti, snúi seg um treytað koyrikort. At seta krav um treytað koyrikort krevur stórt politiskt dirvi, tí hetta verður ikki vældámt av teimum, sum skulu taka koyrikortið. Hetta tí eitt treytað koyrikort kann fatast sum ein avmarking av persónliga frælsinum. Hinvegin hava nógv lond treytað koyrikort, og eiga vit tí her hjá okkum ikki at halda okkum aftur við at seta eina slíka skipan í gildi.

Vit her á blaðnum loyvdu okkum í tjakinum um ferðslutrygdina at vísa á koyrifrálæruna. Koyrilærararir gera eitt gott arbeiði – eingin ivi um tað. Hinvegin skerst ikki burt, at tað er dýrt at taka koyrikort og spurningurin er um ikki koyrikortið eigur at vera ein rættur hjá borgaranum. Um koyrikortið gjørdist ókeypis, kundi samfelagið sett heilt onnur og nógv strangari krøv til tey, sum skulu upp til roynd. Í hesum sambandi kundi frálæra í ferðslupsykologi fingið sítt rætta pláss í koyrilæruni. Hetta hevði havt sín týdning fyri ferðina á vegunum, sum er størsta vandamálið í løtuni, tá um ferðslutrygd ræður.

Annað mál, sum vit fleiri ferðir hava tikið upp á hesum stað, men sum ikki hevur givið nakra reaktión ella respons á rætta stað er spurningurin um politieftirlitið á vegnum, her serliga um næturnar og ikki minst nú vit hava kollvelt okkara ferðslunet í og við at vit hava fingið fyrsta undirsjóvartunnilin og harvið hava givið teimum ungu nýggjar og spennandi møguleikar í ferðsluni. So tað skal enn einaferð verða heitt á løgregluna um at stíga fram og vera við í hesum tjakinum og tá taka í egnan barm. Løgrregjan ger eitt gott og vigtugt arbeiði. Men spurningurin er, strekkir tað til. Og tá kundi so eisini verið spurt, hvussu stætt er við játtanunum til politiiið. Røkka tær kanska ikki til at røkja so týðandi uppgávur sum at hava eftirlit um næturnar og á knútapunktum sum undirsjóvartunnilin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hatrið hjá Jan Müller

**Sjúrður Skaale**

**Politiska manipulatiónin hjá blaðstjóranum á Sosialinum er stundum so skendsk, at hon undirgrevur fólkaræðið.**



11. september doyr Anna Lindh eftir at vera stungin niður dagin fyri. Flest øll bløð í Norðurlondum taka í tí sambandi upp støðuna hjá fólkaræðinum og tí opna samfelagnum.

Spurningarnir, sum verða settir, eru m.a. um orðaskiftið er vorðið ov rátt, um hatur er komið uppí, og um fólkaræðið orsakað av hesum er komið undir trýst.

Mánadagin 15. september, fýra dagar eftir at Anna Lindh er deyð, tekur blaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller, spurningin upp í oddagreinini í Sosialinum.

Hann leggur soleiðis fyri: "Ein og hvør, sum fylgir við tí, sum hendir í heiminum fyri tíðina, má ásanna, at fólkaræðið er undir einum ávísum trýsti". Hetta harmast hann um, tí tað er "ein fortreyt fyri einum vælvirkandi fólkaræði, at orðaskiftið verður hildið á einum sakligum og sømiligum støði". Sum flest aðrir Norðurlendskir blaðstjórar gjørdu beint eftir morðið á Annu Lindh, ásannar Jan, at tað sømiliga støði "ikki altíð er galdandi fyri politiska orðaskiftið í Norðurlondum". Síðani vendir hann kikaran móti Føroyum, og leggur afturat "og heldur ikki her hjá okkum".

Og sambært Jan er støðan rættiliga álvarsom hjá okkum: "Tónin í Føroyum er mangan harður ja, næstan hatskur hjá teimum, sum gera politiskar viðmerkingar og hjá ávísum politikarum", sigur hann.

Síðani kemur staðfestingin av, hvør er offur fyri hesum næstan hatska tóna: "Hetta gongur mest út yvir tey, sum ikki taka undir við fullveldispolitikkinum. (...) Serstakliga gongur hetta út yvir Javnaðarflokk og út yvir fólk, ið verða hildin at hava samhug við hesum flokki," skrivar Jan Müller.

Og tað er ikki bara tað reint politiska orðaskifti, sum er farið av kós. Jan vísir eisini á vandan fyri einsrætting av føroyskum ands- og mentanarlívi, og sigur, at "tá listaverk verða ummæld, tað verið seg bøkur ella onnur list, kann tað tykjast sum politiski litur listamansins ávirkar ummælini."

**Einki grundarlag**

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at Jan Müller málar hesa óhugnaligu myndina av politiska lívinum í Føroyum. Hann hevur áður ført fram, at fólk, ið taka undir við føroyskum fullveldi, eru ódemokratisk, ósaklig og ósømilig. Og at tey eru full í hatri.

Javnaðarfólk, hinvegin, eru demokratisk, góð og saklig. Men tey verða hatað, tí tey stuðla Javnaðarflokkin. Tað nýggja er nú, at eisini listarfólk verða dømd eftir síni politisku sannføring.

Hetta eru ótrúliga grovir pástandir at seta fram móti teimum debattørum, sum stuðla sjálvstýrisgongdini, og teimum, sum ummæla list í Føroyum. Tann, sum aftur og aftur ákærir fólk fyri at hata, má standa á ógvuliga tryggari og própfastari grund.

Men Jan prógvar ongantíð, hví sjálvstýrisfólk eru so nógv óndari enn javnaðarfólk. Aftur og aftur roynir hann at mana fram hesa óhugnaligu myndina, uttan at nevna hvørki nøvn ella dømi.

Tað er heldur ikki av umsorgan fyri fólkaræðinum, at Jan skrivar, sum hann ger. Orsøkin er heldur ikki, at Jan Müller líður av psykisku sjúkuni paranoia.

Orsøkin er kaldur og kyniskur partapolitikkur!

**Greiður taktikkur**

Taktikkurin er léttur at gjøgnumskoða:

Jan roynir at samantvinna eina ávísa politiska hugsan — sjálvstýrishugsanina — við diktatur og hatur, fyri at fáa fólk at venda sær frá hesi hugsan.

Jan setir ikki nøvn á tey, sum hata. Kanska er hetta tí hann er ov feikur, kanska tí hann rætt og slætt ikki hevur nøkur nøvn. Undir øllum umstøðum man hann halda, at hann á hendan hátt sleppur undan at standa til svars fyri síni álop og verða ákærdur fyri ærumeiðing, tí eingin tekur álopini at sær persónliga.

Við nú eisini at draga listarfólk upp í hetta, signalerar Jan, at hatrið hjá landsins sjálvstýrisfólkið nú breiðir seg útum politikkin, og rakar alt samfelagslívið. Nú ræður altso um hjá øllum at taka dystin upp ímóti fullveldisfólkunum.

Við at seta javnaðarfólk upp sum tey óseku offrini, ið verða forfylgd fyri rættvísis sakir, ger Jan greitt, hvørjum tú skalt stuðla, skalt tú vera við til at steðga hatrinum.

Og so setir Jan alt í perspektiv við innganginum til greinina, sum altso varð prentað fýra dagar eftir at Anna Lindh var deyð: Tann, sum fylgir við í heiminum fyri tíðina, sær, at demokratiið er undir trýsti, og at orðaskifti í Norðurlondum er vorðið ósakligt og ósømiligt — eins og í Føroyum!

Hetta er, snøgt sagt, at fara undir lágmarkið. Hetta er politisk manipulatión tá hon er allar mest ósaklig, allar mest skendsk, og allar mest undirgravandi fyri tað demokratiska kjakið.

(Enn verri verður tað sjálvsagt tá hugsað verður um, at fleiri av Jansa partamonnum teljast millum landsins ósakligastu debattørar).

**Nevn nøvn!**

Alt tað, Jan Müller kastar sínum landsmonnum fyri, rakar hann sjálvan beint aftur í høvdið.

Men hóast hann avdúkar seg sjálvan, eigur hann ikki at sleppa skriva soleiðis óátalað. Sum blaðstjóri hevur Jan Müller stóra ávirkan og stórt vald. Hetta stóra vald gevur honum eisini stóra ábyrgd. Og tey, sum taka lut í politiska kjakinum, og hava hug at hella sjálvstýrisvegin, kunnu ikki standa model til Jansa afturvendandi, adressuleysu ákærur. Jan Müller eigur tí at svara hesum spurningum:

Hvat eru tað fyri javnaðarfólk, sum verða so illa viðfarin og so illa hatað? Hvørji eru tey, sum eru so órein við javnaðarfólk og hata tey so illa? Hvat eru tað fyri listarfólk, hvørs verk eru dømd eftir teirra politiska liti? Og hvørjir eru teir ummælarar, sum hava dømt listarverk eftir politiska liti listarfólksins?

Ikki fyrr enn Jan Müller hevur sagt nøvnini ber til at reinsa luftina.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Prestar kunnu ikki fyrigeva syndir, sum onnur gera móti Gudi

**Ebbedinna Jacobsen**

Einaferð í vetur, tá útvarpið byrjaði tíðindsendingina kl. 18.30, segði útvarpsmaðurin, at onkur ynskti at fáa hendan spurningin svaraðan:

"Hvør hevði uppfunnið tann sið at kasta jørð á kistuna við jarðarferðir?"

Samstundis segði útvarpsmaðurin, at Emil Olsen skuldi svara spurninginum. Emil Olsen segði, at hetta høvdu vit fingið frá katolikkunum. Hann segði eisini, at vit hava fingið so nógv annað frá katolikkunum, men hann segði ikki hvat tað var.

Tá hugsaði eg: "Hvat hevur fólkakirkjan fingið frá katolikkunum?" Jú, haðani er barnadópurin, konfirmatiónin, altargongdin og jørðákastingin komin.

Tá ið Emil segði, at tað var so nógv, sum fólkakirkjan hevði fingið frá katolikkunum, so er helst eisini okkurt annað, sum eg ikki veit um.

**Ein læra, sum stríðir ímóti Skriftini**

Eg minnist tá ið eg sum barn gekk í kirkju og til altargongd, tá hoyrdi eg, at um tey, ið fóru til altars, angraðu av hjarta, kundi prestur fyrigeva teimum allar syndir teirra "við Jesu sanna likami og blóði", sum sjálvandi einans var vanligt breyð og vanligt vín, tí Jesu blóð rann, alt sum tað var, úr likami hansara og niður á jørðina við Golgata, og likam hansara var ikki lutað sundur í petti, men lá í grøvini í heilum líki til hann reis upp og fór til himmals.

Í dag hoyrist við altargongd í útvarpsgudstænastum, at sagt verður, meðan breyðið og vínið verður givið teimum, sum eru farin til altars:

"Hetta er Jesus sanna likam" og "hetta er Jesu sanna blóð."

Men tað skal ein og hvør vita, at tað kann gera tað sama hvussu nógv góð orð verða søgd eina slíka løtu, tey kunnu ikki geva nøkrum menniskja syndafyrigeving.

Bíblian sigur, at vit skulu ikki eta blóð so at læran um at "hetta er Jesus sanna blóð"stríðir beinleiðis ímóti Bíbliuni. (Ápostlasøgan 15,20; 3. Mósebók 3,17 og 17,14)

**Gudsspottan**

At hugsa sær, at menn og kvinnur keypa vín úr rúsuni at geva teimum, sum fara til altars og siga teimum, at "hetta er sanna Jesu blóð," haldi eg vera langt av leið - ja, gudsspottan.

Eitt veit eg við vissu út frá Guds orði - og tað er: At Gud hevur ikki brúk fyri nøkrum altari nú!

Altartíðin og ofringin fyri synd er langt síðani liðug. Seinasta altarið, sum Gud góðtók, var krossurin á Golgata har Jesus varð ofraður. Hetta er einasta offur sum Gud góðtekur fyri synd.

Eingin prestur er millummaður millum Gud og okkum Ikki er neyðugt at fara til altars fyri at fáa syndafyrigeving. Hana fáa vit einans við at vit beinleiðis søkja fyrigeving Guds gjøgnum Jesus Kristus. Eingin prestur kann geva syndafyrigeving, tí hann er sjálvur ein syndari sum øll onnur og hann hevur sjálvur brúk fyri syndafyrigeving frá Gudi. Skrivað stendur:

"Slíkan høvuðsprest var tað eisini, vit máttu hava, heilagan, sakleysan, reinan, skildan frá syndarum og settan høgt upp um himlarnar, ein, sum ikki hvønn dag hevur fyri neyðini - eins og høvuðsprestarnir at bera fram offur, fyrst fyri sínar egnu syndir og síðani fyri fólksins, tí hetta gjørdi hann eina ferð fyri allar, tá ið hann ofraði seg sjálvan." (Hebrearabrævið 7,26-27)

Eingin prestur er settur sum millummaður millum Gud og okkum. Vit hava EIN millummann millum Gud og okkum - og tað er Jesus, sum skrivað stendur:

"Ein millummaður er millum Gud og menniskju, menniskjað Kristus Jesus." (1. bræv Timoteusar 2,5)

**Um at tala ósannindi og vitna rangt**

Bíblian talar um at fara lætt um sannleikan og bera fram ósannindi, sum er serstaka álvarsamt í andaligum viðurskiftum og tað sum hevur við frelsu og syndafyrigeving okkara at gera.

Hesi skriftorð tala fyri seg:

"Seks eru, sum Harrin hatar, sjey eru sál Hansara andstygd: Stolt eygu, følsk tunga, hendur, ið úthella sakleyst blóð, hjarta, sum smíðar saman ónd ráð, føtur, ið eru kvikir til tað, ið ilt er, ið talar lygn og vitnar rangt og tann, ið setur split millum brøður." (Orðtøkini 6,16-19).

# Hví hjálpti eingin Jóannesi?

**Lasse Klein**



Fyrstu ferð undirritaði hoyrdi tíðindini um handan ambassadørdøgurðan, hugsaði eg hvussu slíkt yvirhøvur kundi koma fyri tá so nógvir "samstarvsfelagar" og so nógvir "vinmenn" luttóku á samkomuni, teir høvdu jú møguleika at velja millum ódnarstormar og lágtrýst, skrivar Lasse Klein.

Vit kunnu øll verða samd við Jóannesi tá hann í Sjónvarp Føroya viðgekk at hatta var eitt ótrúliga óheppið mistak. Hann kom ikki við undanførslum, men legði kortini á borði.

Botnurin hann hevði lagt var ov dyggur, so gekk bara ikki, og síðani kom treytaleysa umberingin.

**Tíðliga og seint**

Fjølmiðlarnir sum altíð hava eitt vaki eyka fyri slíkum tíðindum vóru skjótir. Fyrst Dimmalætting og síðani Fregnir, og aftaná at alt var yvirstaðið kom Oyggjatíðindi darlandi við somu tíðindum, meðan Sosialurin var meira varðin, og viðgjørdu hendingina aftaná at alt var yvirstaðið. Útvarpið og sjónvarpið vóru dúgligir tíðindaberar hendan dagin, og livdu upp til almennu uppgávu sína, og fingu ikki afturhald.

Ábyrgdarfólk javnaðarfloksins vóru álopin tíðliga og seint, at gera viðmerkingar til hendingina.

**Á einum silvurfati**

Politisku eygleiðararnir hómaðu stórtíðindi, har formaður Javnaðarfloksins var noyddur at leggja frá sær. Politisku "mótstøðumenninir" høvdu einki sæð og einki hoyrt.

Soleiðis sum tíðindini bórust, var als eingin ivi um, at mótstøðumenn Jóannesar yngstu høvur hansara á einum silvurfati.

**Men hvar vóru teir**

Allir vinnmennirnir. Allir samstarvsfelagarnir. – Øll tey sum kundu forða fyri at hendingin gjørdist stórtíðindi í føroysku fjølmiðlunum – undantikið sjálvandi Sosialurin sum valdi sær annað høvuðsevnið?

Eg má viðganga at eg eri eitt sindur illgrunasamur serstakliga tá tað snýr seg um hesi stórtíðindi: at farið var eftir manninum í staðin fyri bóltinum.

**Nýggja keipumynd?**

Væl veit eg at tað hevur stóran politiskan týdning fyri mótstøðuflokkarnir at keipumyndin av formanni Javnaðarfloksins bleiv skift út, men eg haldi ikki at tað skal gerast undir slíkum umstøðum, tá hugsa verður um, at "vinnmennirnir" og "samstarvsfelagarnir", høvdu møguleika fyri at velja millum ódnarstormar og lágtrýst.

Um so er at formaður Javnaðarfloksins gjørdi Føroyingum fyri skommum á hasi samkomuni, eiga tey sum ikki forðaðu fyri at hetta hendi, líka stóran part av skommini. Tíverri fyri "kamiratarnir" valdu teir ódnarstormar.

# Mín ketta dansar tango

**Bergtóra Justinussen**

Vit kundu ringja inn til útvarpið fríggjamorgunin. Hetta var ein frálíkur máti at koma við heilsu og siga fólki frá tí, sum fór fram ímóti nøkrum neyðars kettum. Alt gekk væl, eg kom rættiliga skjótt ígjøgnum og slapp at velja mær eitt lag. Útvarpið skuldi ringja aftur, men ongin ringdi. Tit fáa heilsuna her ístaðin:

Góðu tit øll.
Summa staðni veksur talið av kettum, ið ongan góðan hava. Onkur kommuna hevur fólk til at fanga tær og drukna tær. At drukna dýr er at geva teimum ein óneyðuga langan og pínufullan deyða. Hetta er djórapínsla, og tað er ikki loyvt. Havið í huga, at hesar kettur eisini taka mýs og rottur. Har sum ketta er, koma ongar rottur og mýs. Ketturnar gera tað, at okkum ikki nýtist at leggja so nógva gift út. Vit áttu at hjálpt kettunum ístaðin.

# Tann hvíti hundurin

**Djóraverndarfelagið**

4. september 2003 ringir ein kona til mín og sigur mær frá einum stórum, hvítum, eitt ára gomlum hundi. Ein maður hevur fingið hann í dag, og nú vil hann skjóta hann, tí hann goyr so illa. Hon heldur, at hundurin ræðist mannin. Maðurin ber orð fyri at fáa sær hund og drepa hann heilt skjótt aftaná. Hesin maður eigur ikki at hava hund. "Hjálp hundinum," sigur hon óttafull. Heldigvís veit hon, hvaðani hundurin kom.

Tað eydnaðist mær at koma í samband við bóndan, ið hevði latið hundin. Bóndin sigur: "Hann fekk hundin í dag; men um hann goyr? Hvør er tað, ið ringir? Hvør hevur boðað frá tí?" "Hetta er Djóraverndarfelagið. Tygum mugu bjarga hundinum frá einum sovorðnum manni, tygum mugu taka hann aftur." Bóndin tyktist taka meira synd í sær sjálvum: Hann trúði ... og han helt ... Eg biði hann um at skunda sær. Jánkasliga sigur hann, at hann skal ringja í morgin.

5. september ringi eg til mannin, ið fekk hundin, sigi honum, at eg fari at skriva søguna um hansara hvíta hund, sum hann fekk ígjár. Hann hevði serstakliga ynskt sær ein hvítan hund. "Hvør er tað?" "Djóraverndarfelagið," sigi eg. "Jaaa, eg havi hann ikki meira. Hundurin var so villur. Eg royndi at kela honum; men hann beit meg. Eg fekk ein mann at skjóta hann í dag." Eg sigi: "Ein fremmandan hund mást tú ikki røra. Hann má sjálvur koma til tín, tá hann kennir seg tryggan og veit, at tú ert góður við hann. Og tú fekst hundin í gjár og hevur longu dripið hann í dag?" Eg sigi, at hann má ongantíð fáa sær hund aftur. Hetta lovar hann mær.

6. september ringir bóndin, prátar, sigur seg hava viljað tikið hundin aftur. Hann hevði tosað við mannin, ið sigur, at hundurin var skaddur um lendarnar; men bóndin sigur: "Tað deiliga dýrið. Honum feilti onki, tá hann fór frá mær. So nýtist mær ikki at fara eftir honum í dag."

So illa kann ein hundur koma fyri, latin í fremmandar hendur. Tey, ið lata ein hund frá sær, eiga at tryggja sær, at hann kemur til góð fólk. Tú kanst evt. spyrja aftur til hundin, hvussu hann hevur tað, og hvussu hann er fallin til. Tey, ið seta hvølpar við, eiga at hugsa seg um meira enn eina ferð.